# Norðuratlantsbólkurin nýggjan skrivara




*Sjúrður Skaale gevst nú á Christiansborg, eftir at hann seinastu fýra árini hevur virkað sum skrivari fyri Norðuratlantsbólkin á Fólkatingi*

**Sjúrður Skaale hevur verið skrivari fyri norðuratlantsbólkin síðan hann var stovnaður, men nú pakkar hann saman á Christiansborg og flytir til Føroyar. Nýggi skrivarin hjá bólkinum verður Heini í Skorðini**

CHRISTIANSBORG
*Marjun Dalsgaard*

Eftir fólkatingsvalið er greitt, at Norðuratlantsbólkurin heldur fram við somu manning, sum stovnaði bólkin í november 2001, nevniliga Høgna Hoydal og teimum báðum grønlendsku umboðunum Kuupik Kleist og Lars-Emil Johansen. Sum skrivari hevur Sjúrður Skaale eisini verið ein fastur partur av bólkinum síðan 2001 og hevur myndað tað arbeiði, sum bólkurin hevur valt at brúka sín pening til. Millum annað stóð hann fyri fólkarættarkanningini, sum var almannakungjørd í heyst. Nú flytir Sjúrður heim til Føroyar og heldur tískil, at tað er best at gevast á Christiansborg, har hann hevur havt sín dagliga dag í nærum trý ár.

Sum allir aðrir tingbólkar á Christiansborg, fær Norðuratlantsbólkurin eina ávísa upphædd um mánaðin til lønir, eins og teir fáa eina fasta upphædd fyri hvønn tinglim, sum er í bólkinum, til at gera upplýsandi arbeiði við. Einasta kravið er, at peningurin verður brúktur til verkætlanir, sum geva upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri parlamentariska arbeiði í fólkatinginum – til dømis, bøta um grundarlagið fyri at gera lógaruppskot ella broytingar í verandi lóg.

– Tað er so nógvur peningur í hesari skipanini, at møguleikarnir eru óavmarkaðir, sigur Sjúrður Skaale. Fólkarættarliga kanningin er til dømis gjørd fyri hesar miðlar og, tað næsta verkætlanin verður væntandi, at kanna, hvussu peningastreymurin er millum Danmark og Føroyar og Danmark og Grønland, hvussu nógv fer hvønn vegin.

– Í roynd og veru kanst tú kanna alt – til dømis, hvussu umstøðurnar hjá føroyingum og grønlendingum eru í Danmark – ella hvussu nógvir føroyingar eru til – tað er tað eingin sum veit fyri vist. Hetta er alt upplýsandi arbeiði, sum er sera hent og eg síggi Norðuratlantsbólkin, sum ein møguleika fyri at gera upplýsandi arbeiði um Føroyar og at virka sum ein longri armur hjá Føroysku mynduleikunum, sigur Sjúrður Skaale, og leggur aftrat at atfinningarnar úr Føroyum, um at teirra virksemi skal verða landsskaðiligt er heilt burturvið og grovar ákærur.

– Hatta er sovorðið, sum danir vóru koyrdir í gegið fyri eftir annan verðaldarbardaga – landsskaðiligt virksemi – vit gera upplýsandi arbeiði – hatta er heilt burturvið, sigur Sjúrður Skaale.

Hetta er nógvur peningur, í øllum førum eftir føroyskum mátistokki, og møguleikarnir eru óavmarkaðir, sigur Sjúrður. Kravið fyri at nýta peningin er, at verkætlanin skal hava eitt endmál, sum kann parlamentariska

– Tað einsasta Í hesari skipanini verður so nógvur peningur brúktur til upplýsandi arbeiði, at eg øtaðist at byrja við, sigur Sjúrðu Skaale. Norðuratlantsbólkurin fær, sum aðrir tingbólkar eina mánaðarliga upphædd frá Fólkatinginum, at arbeiða fyri, og hetta gevur óavmarkaðar møguleikar, sigur Sjúrður Skaale.

– Alt kann lata seg gera. Faktisk var eg skelkaður yvir, hvussu nógvan pening, tú hevur at arbeiða við, eg havi kunna gjørt akkurát, sum mær lysti – sett so nógvar serfrøðingar, sum eg havi havt brúk fyri, og so framvegis, sigur Sjúrður.




*Heini í Skorðini er settur í starvið sum skrivari fyri Norðuratlantsbólkin. Heini lesur samfelagsfrøði á Lærda Háskúlanum í Keypannahavn og starvið verður sostatt ikki fulltíðarstarv*

## Tónakrás í Fuglafirði

**Ársins Føroyingur og onnur spæla, tá konsert veður hildin í Fuglafirði mikukvøldið**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Tað er áhugabólkurin, sum hevur skipað fyri vitjanini við navnframa amerikanska undirhaldsadvokatinum Robert E. Gordon, sum skipar fyri konsertini. Endamálið við konsertini er at sýna fram tað besta innan føroyskan tónleik fyri Roberti og øllum øðrum sum vilja hoyra nøkur av fremstu føroysku tónlistarfólkunum.

Millum tey, sum verða at hoyra á palli hetta kvøldið, eru Eivør, Salt, Týr, GoGo Blues, Kári Sverrisson og Jóannes Andreassen, so tað er greitt, at talan er um nøkur av fremstu tónleikanøvnum okkara.

Vitjanin hjá Robert E. Gordon hevur til endamáls at savna vitan um tónleikaídnaðin og hevur gingið sera væl higartil. Sunnudagin greiddi Robert frá hendingaríka lívi sínum á eini hugnaløtu í Hafina Lounge, har Knút Eystursteín eisini spældi løg av nýggju fløguni hjá sær.

Mánadagin hevði Robert sera væleydnaða framløgu í Norðurlandahúsinum m.a. um hvussu løgligi parturin av tónleikaídnaðinum er skrúvaður saman viðv. rættindum, kontraktum, royalties, umboðan og mongum ørðum.

Mikumorgunin skal Robert hitta vinnumálaráðharran Bjarna Djurholm og mentamálaráðharran Jógvan á Lakjuni. Síðan gongur leiðin til forngripasavnið og har frá norð til Gøtu, har vitjað verður í Blásastovu og gomlu Kirkjuni, áðrenn leiðin gongur til Fuglafjarðar á Tónakrás konsertina.